# Óvissa er um virkið í Vestmanna



**ÓVISSA** Tá tú tosar við fólk aftanfyri stóra fiskivinnusamtakið, sum nú er skipið, bendir nógv á, at tey fyrstu virkini, sum lata upp, verða fiskavirkini í Runavík og á Toftum

Vilmund Jacobsen

Tá nýggja og stóra fiskivinnusamtakið keypti seks skip og fýra fiskavirkir, vóru fólk fegin í teimum bygdum, har hesi virki liggja.

Á sínum heimasíðum ynsktu kommunur nýggja samtakinum tillukku og góða eydnu eins og fólk, sum hava starvast á hesum virkjum, gingu við einum smíli.

Hjá vágbingum vardi gleðin ikki leingi, tí skjótt fræettist, at eitt alifelag í Suðuroy skal yvirtaka stóra fiskavirkið frá samtakinum og brúka tað til kryvjivirki. Kryvjivirki er í Vági, men nú fær felagið nógv betri og rúmligari umstøður.

### Vestmanna?

Seinastu dagarnar hevur ligið í kortunum, at virkini í Runavík og á Toftum lata uppaftur heilt skjótt.

Poul Hansen, nevndarformaður, hevur eisini váttað, at virksemi á hesum báðum virkjum kemur í gongd aftur rættiliga skjótt.

Hinvegin hoyrist lítið ítøkiligt um, hvussu verður við fiskavirkinum í Vestmanna, og heilt óhugsandi er ikki, at tað endar sum virkið í Vági, har aðrir taka yvir.

Sosialurin hevur tosað við Poul Hansen, og vit hava eisini tosað við vinnulívsfólk í Vestmanna, men í løtuni ber ikki til at fáa nakað ítøkiligt at vita um, hvussu verður við fiskavirkinum í bygdini.

Spurningurin er, um tað verður samtakið, sum nú er skipað, ið letur virkið uppaftur, ella um tað møguliga verður onkur annar.

Sum skilst, hevur fiskavirkið í Vestmanna annars verið eitt av teimum, sum hevur havt líkinda rakstrarúrslit.

### Sterkt vinnulív

Í Vestmanna er annars stór skipavinna og sterkt vinnulív. Fleiri skip eru heimahoyrandi í bygdini, og har eru dugnaligir vinnulívsmenn.

Tá tú tosar við onkran teirra, siga teir seg eisini hava skilt, at fiskavirkið í Vestmanna ikki liggur fremst hjá nýggja samtakinum.

Spurdir, um hugsandi er, at vinnulívið í Vestmanna yvirtekur fiskavirkið, eins og alifelagið í Vági ger, siga vinnulívsfólk, at ov tíðliga er at siga nakað um tað enn.

– Enn veit eingin við vissu, hvat nýggja samtakið ætlar við virkinum í Vestmanna, men eftir tí, ið sagt hevur verið, bendir lítið á, at okkara virkið liggur so frammarlaga í røðini, siga vinnulívsfólk í Vestmanna.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Polarhav og Stjørnan góðan túr

**GÓÐ VEIÐA** Polarhav og Stjørnan hava gjørt ein góðan upsatúr. Eftir at hava fiskað í minni enn eina viku, landaðu skipini sløk 400.000 pund av góðum upsa á landingarmiðstøðini Kongshavn



*Polarhav og Stjørnan fingu á seinasta túri nógvan, stóran og góðan upsa*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Vilmund Jacobsen

Seinasta fríggjadag vóru ísfiskatrolararnir, Polarhav og Stjørnan, inni við sløkum 400.000 pundum. Landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará landaði skipini, og har siga tey, at veiðan var stórur og góður upsi, meginparturin 1, 2 og 3'arar.

– Aktiva royndin hjá Polarhavi og Stjørnuni hendan túrin var mini enn ein vika, og tá er talan um góða veiði, siga tey á Kongshavn.

Seinasta hósdag var garnaskipið Oknin inni við umleið 14.000 pundum av havtasku.

Enn eru eingi av teimum seks skipunum, sum nýggja samtakið hevur keypt, komin aftur av túri.

Skipini eru á fyrstu túrunum, og óvist er, nær tey fyrstu skipini koma inn aftur at landa.

Sum skilst, lá Heykur, sum partrolar saman við Falki, við bryggju nakrar tímar seinasta fríggjadag, tí okkurt ikki riggaði, sum tað skuldi.

Óvist er eisini, hvar skipini fara landa, nú skip og landingarmiðstøð ikki longur eru undir sama "hatti".

*vilmund@sosialurin.fo*